Áhugabólkurin fyri eldri:

# Onkur má tosa teirra søk

**- Tað kann ikki verða rætt, at tey, sum eiga æruna av okkara vælferðarsamfelag, skulu verða við sviðið soð, nú tey hava tørv á hjálp. Onkur má tosa teirra søk og gera vart við teirra tørv, siga tey í Áhugabólkinum fyri eldri í Klaksvík, sum áhaldandi arbeiða fyri at betra um umstøðurnar hjá teimum gomlu í býnum**

ELDRAØKIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Áhugabólkurin fyri eldri í Klaksvík skipar trúliga fyri tiltøkum til frama fyri tey eldru í býnum. Skerjingarnar á eldrøkinum í seinastuni fáa ikki ídnu kvinnurnar at setast aftur*

Fyri Áhugabólkin fyri eldri í Klaksvík var tað sum at fáa ein frammaná, at hoyra um sparingarnar á eldraøkinum. Hóast ymisk tilboð eru til tey eldru í býnum, er tørvurin als ikki nøktaður, og tí undrar tað tey stórliga, at júst hetta økið skal rakast so hart av sparingum

- Fyri nøkrum árum síðani vóru 1000 borgarar í Klaksvík omanfyri 60 ár, og vit vita, at talið bara veksur. Tí kann tað ikki koma óvart á politikarnar, at eldraøkið eisini tørvar meir pengar, undrast tey í Áhugabólkinum.

## Sum ein bumba

Síðani 1997 hevur Áhugabólkurin skipað fyri ymsum tiltøkum fyri teimum eldru í Klaksvík, so tey vita av royndum, hvussu stórur tørvurin er. Eitt nú er tað ikki óvanligt, at eini 200 eldri møta til veitslurnar, og ongin ivi man vera um, at Eldraløtan Úti í Grøv er ein heilt serligur dagur í árinum fyri nógv av teimum.

- Vit síggja jú, hvussu glað tey blíva fyri tað, sum verður gjørt fyri tey. Tí er tað ómetaliga syndarligt at síggja, hvussu tey ferð eftir ferð verða sett í aftastu røð, tá pengar skulu brúkast uppá eitthvørt. Tað slepst ikki undan, at hetta er ein spurningur um raðfesting, tí vit síggja jú, at samfelagið hevur ráð til so nógv annað, sigur Maria Klein, limur í Áhugabólkinum.

Gerda Absalonsen er eisini limur í bólkinum, og eisini hon undrast stórliga yvir skerjingarnar, sum hava rakt økið í seinastuni.

- Eg skilji heldur ikki, hví hetta nærum skuldi koma sum eina bumba við at skerja so ógvusliga og knappliga. Tað kann jú ikki koma óvart á nakran politikara, at tað gerast alsamt fleiri eldri, sum hava tørv á ymsum tilboðum. Ein fær næstan illgruna um, at politikarnir als ikki vita, hvussu tey gomlu í okkara samfelag í veruleikanum hava tað, sigur Gerda. Hon leggur afturat, at eftir hennara tykki áttu allir politikarar at farið út á stovnarnar og tilhaldini, so teir sjálvir sóðu, hvussu tey gomlu hava tað, og hoyrdu, hvat rørist millum tey.

- Tey gomlu hava ongantíð verið von við at fáa nakað fyri onki. Nú, tey sjálvi ikki kunnu arbeiða longur, eru tey oftast bara so ómetaliga glað fyri tað, sum verður gjørt fyri tey. Men tað er hvørki rætt ella rímiligt, at tey skulu finna seg í at verða tey fyrstu at verða skúgvaði til viks. Og tá tað jú ikki liggur til tey at grenja og finnast at, má onkur annar tosa teirra søk, slær Gerda fast.

## Setast ikki aftur

Lítið hugaligu hendingarnar á eldraøkinum seinastu tíðina fáa tó ikki Áhugabólkin at setast aftur við teirra virksemi. Bólkurin skipar trúliga fyri loppumarkna, køkutombola og øðrum fyri at savna pening inn, sum á onkran hátt skal koma teimum eldru í Klaksvík til góðar. Bólkurin legði nógva orku í at skunda undir byggingina av Sambýlinum á Heygum, sum stóð liðugt fyri tveimum árum síðani. Og tær hava heldur ikki mist vónina um, at kjallarin í Sambýlinum einaferð verður gjørdur til eitt nýtt dagtilhald fyri tey eldru, sum upprunaliga ætlað.

- Umstøðurnar her kundu ikki verðið betri. Her er alt longu gjørt, her er lætt at koma til og tað er eyðsæð, at tey gomlu, sum búgva í Sambýlinum, eisini kunnu fáa gleði av teimum tiltøkum og ítrivum, sum verða í tilhaldinum, sigur Maria.

Eitt annað Dagtilhald er í býnum, sum virkar væl, og sum tey gomlu eru glað fyri. Men tørvurin er framvegis stórur, og tí hald tey í eldrabókinum tað vera stórt spell, at kjallarin í Sambýlinum bara stendur tómur og annars verður brúktur til goymslu hjá ymsum fyritøkum í býnum.

- Vit hava savnað eini 100.000 krónur inn, men tað er jú mark fyri, hvat ein sjálvboðin bólkur sum hesin megnar einsamallur. Nú vóna vit at koma á tal við býráðið sum skjótast, so gongd veruliga kann koma á arbeiðið, so tey gomlu kunnu hava okkurt at síggja fram til, siga kvinnurnar í Áhugabólkinum fyri eldri í Klaksvík.

# Tey gomlu eru bangin

**- Sparingarnar á eldraøkinum hava skapt stóran ótryggleika bæði millum starvsfólk og tey gomlu. Nú vit fóru í summarfrí vóru tey gomlu bæði kedd og bangin um, hvat fer at henda við teirra Dagtilhaldi aftaná summarfrítíðina, sigur Mamy Dahl Sørensen, leiðari á Dagtilhaldinum í Klaksvík**

ELDRAØKIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Mamy Dahl Sørensen, leiðar á Dagtilhaldinum í Klaksvík, vísir á nóg stór játtan til edraøkið er eitt stórt sparitiltak í sær sjálvum.*

Um landsstýrismaðurin í almannamálum, Hans Pauli Strøm, ikki megnar at finna vantandi peningin, letur einasta dagtilhaldið fyri tey eldru í Klaksvík aftur um stutta tíð

- Vit hava pengar til at halda fram við vanliga virkseminum eina tíð afturat. Men verður okkara umsókn ikki gingin á møti, verða vit noydd at lata aftur, og allar ætlanir um víðkaða virksemið framyvir fara fyri bakka, sigur Mamy Dahl Sørensen, leiðari á Dagtilhaldinum í Klaksvík

## Vánalig planlegging

At so ógvusligar sparingar skuldu raka eldraøkið so knappliga, heldur Mamy Dahl Sørensen vera tekin um vánaliga planlegging. Eftir hennara tykki átti tað frá byrjan altíð at verið sett nóg mikið av peningi av til eitt so týðandi økið, sum eldraøkið.

- Tað líkist stutt sagt ongum at spara uppá hendan mátan á eldraøkinum og er als ikki í tráð við góðan javnaðarpolitikk. Peningur, sum verða brúktir á hesum økinum, er eisini eitt tað størsta sparititakið í sær sjálvum, politikaranir kunnu fremja. Eg eri sannførd um, at høvdu tey gomlu ikki eitt stað, sum tilhaldini, sótu nógv av teimum einsamøll heima og forfórust spakuliga og fingu átrokandi tørv á nógv størri hjálp.

Mamy vísir á, at virksemið og sosiala samveran á dagtilhaldinum er við til at økja munandi um lívsvirðið hjá teimum gomlu. Hetta er eyðsæð við til at halda tey so frísk og ferðug, at tey kunnu verða verandi í egnum heimi sum longst. Vit síggja eisini, hvussu alsamt fleiri bygdir útvega líknandi tilboð til tey eldru í nærumhvørvinum - nakað sum bæði er við til at skapa arbeiðspláss og økja um trivnaðin í bygdini sum heild, sigur Mamy.

## Mynstrið broytist

Eftir umsóknunum at døma, er tað ongi ivi um, at alsamt fleiri bygdir framyvir ynskja at geva teirra eldru fleiri tilboð. Fyri at sleppa undan slíkum sparingum, sum hesum framyvir, har slíkar ætlanir fáa mønustingin, má betri planlegging á eldraøkinum til, heldur Mamy.

- Landsstýrismaðurin í almannamálum átti, sum eitt tað fyrsta, at gjørt eina neyva kanning av eldraøkinum yvir eitt longri tíðarskeið, so leggjast kann upp fyri tørvinum á pengum. Mynstið á eldraøkinum broytist allatíðina. Fólk gerast bæði eldri og frískari og verða tí uttan iva meir og meir virkin. Slíkt hevur ein annan tørv við sær, sum ikki eigur at koma óvat á okkum, sigur Mamy.

Hóast hendingarnar á eldraøkinum í seinastuni hava verið óhepnar, heldur Mamy ikki, at landsstýrismaðurin hevur víst ringan vilja til at finna eina loysn.

- Vit áttu ongantíð at verið enda í hesi støðuni, men landsstýrismaðurin vísti beinanvegin ein positivan anda við alt fyri eitt at royna at finna vantandi peningin. Vit vita, at ongin politikari hevur heimild til at býta pening út, sum honum lystir. Tí er tað at fegnast um, at tað kortini er eydnast landsstýrismanninum at finna góðar tvær milliónir til hetta øki, so skaðin verður avmarkaður, inn til ein endalig loysn verður funnin, sigur Mamy Dahl Sørensen